# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-ST-deildin til Darfur fær eina søguliga uppgávu, men hon má mannast sum skjótast*
*(Ban Ki-moon, ST-aðalskrivari).*

# Risastór byrging kann skrædna

**Eftir áhaldandi regn í fleiri mánaðir er so nógv vatn í kinesisku Yangtze-ánni, at myndugleikarnir bera ótta fyri, at ein risastór byrging um ánna kann skrædna**



*Umleið 700 fólk eru druknað í vatnflóðini í Kina í ár, men skrædnar byrgingin um Yangtze-ánna, verður vanlukkan fleiri ferðir størri*

Nú er so nógv vatn oman fyri ta risastóru byrgingina, at hækkar vatnsstøðan tveir metrar afturat, er álvarssamur vandi fryri, at byrgingin skrædnar, og so verður Kina rakt av einari vatnflóð, sum eingin av álvara kann ímynda sær, skriva tíðindastovurnar.

Tann risastóra byrgingin um Yangtze-ánna, sum var liðug fyri einum ári síðani, er gjørd til at klára tað ovurstóra trýstið frá vatninum. Men hon er ongantíð roynd, og tí hava myndugleikarnir onga vissu fyri, at hon stendur mát við ta upprunaligu ætlanina. Longu nú er trýstið á byrgingina sera stórt. Vatnið oman fyri hana er vorðið 600 kilometrar langt, og trýstið veksur fyri hvørt einasta æl, siga teir kinesisku serfrøðingarnir.

Fyri at lætta um trýstið hava myndugleikarnir latið allar slúsurnar á byrgingini upp á víðan vegg. og tað merkir, at tað renna 48.000 rúmmetrar ella næstan 50 tons av vatni úr byrgingini um sekundið. Men tað er kortini ikki nóg mikið til at halda javnvágini, tí tá tað regnar í Mið-Kina, renna meiri enn 50 tons í byrgingina um sekundið.

Fyrimunurin við byrgingini er, at myndugleikarnir kunnu forða fyri vatnflóð longri niðri í ánni. Fyrr var vanligt, at Yangtze fór upp um áarbakkarnar har fimta hvørt ár, men sambært útrokningunum kunnu nú vera 100 ár ímillum hvørja vatnflóð. Skipanin hevur stóran týdning fyri samferðsluna, tí Yangtze er ein týðandi partur av kinesiska samferðslukervinum. Eitt nú kunnu stór bingjuskip sigla eftir ánni heilar 2.400 kilometrar inn í landið til býin Chongqing.

# ST-hermenn til Darfur

**Teir illa útgjørdu afrikonsku hermenninir, sum hava roynt at tryggja frið í Darfur, fáa nú hjálp**



*Nógv túsund sivilfólk hava latið lív í ófriðinum í Darfur, og milliónir eru flýdd til grannalondini*

ST-trygdarráðið samtykti í gjárkvøldið einmælt at manna eina friðarvarðveitandi herdeild, sum skal hjálpa teimum 7.000 afrikonsku hermonnunum, sum higartil hava roynt at tryggja friðin í tí ófriðarliga, sudanska landspartinum Darfur. Uppskotið var frá Belgia, Bretlandi, Fraklandi, Italia, Kongo, Peru og Slovakia.

Í samtyktini stendur, at ST-deildin skal hava heimild til at brúka makt, men tó bara í sjálvverju, og um tað er neyðugt fyri at verja starvsfólk hjá hjálparfelagsskapum. Upprunaliga var ætlanin, at ST-hermenninir skuldu hava heimild til at leggja hald á ólóglig vápn, men tann parturin av uppskotinum bleiv strikaður.

Nýggja deildin fær í mesta lagi 19.000 hermenn afturat teimum 7.000 afrikonsku.

STUTT SAGT

## Senda pengar heim

Tað hevur leingi verið alment kent, at fólk úr Pakistan, Turkalandi og øðrum londum, sum hava búsett seg í Norðurlondum, senda nógvar pengar til skyldfólk í heimlandinum. Í Noregi vísir ein kanning, at á hvørjum ári senda pakistanar, sum búgva í Noregi, umleið 350 mió. norskar krónur til skyldfólk og onnur í Pakistan. Umleið 130 mió. krónur verða fluttar ígjøgnum bankaskipanina, og hitt hava fólk við sær, tá tey fara til Pakistan at ferðast, skrivar NTB. Sambært útrokningum kunnu 350 mió. norskar krónur breyðføða umleið 200.000 fólk í Pakistan í eitt ár.

## Flóttafólk farin

Fýra fólk úr Norðurkorea, sum komu inn á donsku sendistovuna í vietnamesiska høvuðsstaðnum Hanoi fyri einum lítlum mánað síðani, eru nú farin haðani. Av sendistovuni verður sagt, at tey fýra, tvey vaksin og tvey børn, søktu um at sleppa til Suðurkorea. Tað vísti seg ikki at vera nakar trupulleiki, og tey fýra eru nú í Suðurkorea.

## Hávur var brugda

Fyrradagin frættist, at fólk høvdu sæð ein stóran, hvítan háv í Ermasundi nærhendis ensku strondini, og dagin eftir visti okkurt blað at siga, at nú høvdu fólk sæð tveir stórar hávar har. Serfrøðingar svaraðu, at kanska var tað ikki heilt ´phugsandi, at ein hvítur hávur var komin í Ermasund, men at tað kortini var munandi meiri sannlíkt, at talan mundi vera um eina brugdu. Síðani hevur eingin sæð hávin ella hávarnar aftur.